

*Nærum allur búskaparligi parturin á Almannastovuni er miðsavnaður í eina veitingardeild, sum fer at húsast í bygninginum hjá Føroya Sparikassa við Tinghúsvegin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Búskapurin miðsavnaður við Tinghúsvegin

**Tær 700 mió. krónurnar, Almannastovan umsitur á hvørjum ári, verða avgreiddar úr bygninginum hjá Føroya Sparikassa við Tinghúsvegin, sum Almannastovan leigar**

BYGNINGUR
*Turið Kjølbro*

Partur av stóra bygninginum hjá Føroya Sparikassa við Tinghúsvegin í Havn verður leigaður til Almannastovuna. Leigumálið byrjaði í februar mánaði í ár og er ætlað veitingardeildini á Almannastovuni.

- Nærum allur búskaparligi parturin á Almannastovuni er miðsavnaður í eina veitingardeild, ið umsitur mestsum allar tær 700 mió. krónurnar, Almannastovan arbeiðir við á hvørjum ári, sigur Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri á Almannastovuni.

Búskaparligi parturin verður miðsavnaður fyri at gera málsviðgerðina eins og betri sambært teimum bygnaðarbroytingum, stovnurin er fyri í løtuni. Til bygnaðarbroytingarnar eru avgreiddar, framímóti árslok, eru tey øki, ið umsita búskaparliga partin, flutt inn í stóra bygningin. Hesi eru málsviðgerð í sambandi við pensjón, dagpening, barnapengar, og uppihaldspengar.

Stóri bygningurin, Almannastovan ræður yvir í J. Broncsgøtu, er alt ov lítil til nógva virksemið á stovninum. Umframt leigar stovnurin í bygninginum, har Hjálpitólarmiðstøðin heldur til, og í Klaksvík, Saltangará og Suðuroy.

# Broytingin í dagpeningalógini eitt óhapp

**Hóast politiski viljin var at betra um umstøðurnar hjá teimum, sum vóru knýtt at dagpeningaskipanini, vóru gott og væl hundrað fólk av misgáum útihýst úr skipanini**

ALMANNASTOVAN
*Turið Kjølbro*

Lógarbroytingin í dagpeningalógini, sum knappliga útihýsti gott og væl hundrað fólkum, var eitt sokallað "óhapp". Sambært táverandi landsstýrismanni í almannamálum, Sámal Peturi í Grund, var tað als ikki tilætlað, at nakar skuldu verða verri fyri, tá ið lógin varð broytt. Heldur hinvegin var politiski viljin at betra um umstøðurnar hjá teimum, sum vóru knýtt at hesi skipan. Landsstýrismaðurin segði seg ætla beinanvegin at fara undir at fáa fólkini uppí aftur dagpeningaskipanina.

- Roknað varð ikki við avleiðingunum, sum komu, tí løntakaragrundarlagið varð víðkað, tað vil siga, at hóast tryggingartakararnir vórðu sleptir í eini grein í lógini, skuldi ein onnur grein lofta teimum, sigur Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri á Almannastovuni, og vísir til grein 2 í lógini.

- At veruleikin vísir, at nøkur fólk detta niðurímillum greinirnar og ongastaðni hoyra heima, ger, at vit eru í eini nýggjari støðu. Í slíkum førum er tað upp til politisku myndugleikarnar at gera av, um hesi fólk skulu loftast aftur.

Viðvíkjandi teimum sjálvstøðugu vinnurekandi er støðan eitt sindur øðrvísi hóast avleiðingarnar tær somu.

- Dagpeningalógin umfatar lønmóttakarar, sum ikki fáa pening vegna sjúku frá arbeiðsgevara. Sigur til dømis sáttmálin hjá fysioterapeuti ella tannlækna, ið arbeiðir fyri seg sjálvan og er einsamallur í fyritøkuni, at viðkomandi fær løn frá arbeiðsgevara í sjúku, tekur dagpeningalógin ikki við, tí sáttmálin hjá viðkomandi ásetir, at teir skulu fáa pening vegna sjúku frá arbeiðsgevara. At tað er óheppið fyri viðkomandi, ið er einsamallur í egnum virki, er einki at ivast í. Við øðrum orðum eru hesi umfatað sum lønmóttakarar í lógini, men hoyra ikki til persónsskarðan, sum kann fáa útgjald. Hetta er ein bólkur av fólki, sum vóru umfatað í gomlu lógini, men sum eru útihýst í teirri nýggju, sigur Petra Johnsdóttir Joensen, sum leggur afturat, at Almanna- og heilsumálastýrið er kunnað um hesar avleiðingar.

### Dagpeningalógin

Tað hevur ikki eydnast okkum at fingið viðmerking frá landsstýrismanninum í heilsumálum, sum er burturstaddur, um hvat verður gjørt við tey nógvu, sum duttu burtur úr dagpeningalógini, tá ið hon varð broytt í fjør summar. Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, løgfrøðingur á almannadeildini í Trivn-aðarráðnum, upplýsir, at arbeitt verður av øllum alvi við at fáa kunngerðir og reglugerðir uppá pláss.

- At gera kunngerðirnar lidnar, verður raðfest ovast. Fleiri eru um at verða lidnar og fyrst í heyst skulu flestu kunngerðir og vegleiðingar verðið lidnar, sigur Jóan Hendrik Svabo Samuelsen.

Ein grein í dagpeningalógini, arbeitt verður við nú, er greinin, ið umfatar álvarslig sjúk børn. Hon verður broytt soleiðis, at foreldur kunnu verða heima hjá álvarsliga sjúkum børnum og fáa dagpengar. Løgfrøðingurin upplýsir, at tað næsta farið verður í holt við, er tey sjálvstøðugu vinnurekandi, sum høvdu hálva trygging sambært gomlu dagpeningalógini og sum duttu burtur úr í teirri nýggju. Tilmælið er gjørt í málinum og er klárt til politiska støðutakan hjá nýggja landsstýris-manninum.

Arbeiðsbólkurin, sum gjørdi álit um nýggja dagpeningalóg, arbeiddi í nærum tvey ár. Limirnir í bólkinum vóru Jóan Hendrik Svabo Samuelsen, fulltrúi Almanna- og heilsumálastýrinum, Jákup í Gerðinum, Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag, og

Anne Djurhuus, deildarleiðari á dagpeningadeildini á Almannastovuni. Álitið varð almanna-kunngjørt 16. februar 2000. Lítið ár aftaná, tann 16. januar 2001, legði táverandi landsstýriskvinna í almannamálum, Helena Dam á Neystabø uppskot fram á ting um nýggja dagpeningalóg. Sambært viðmerkingunum í lógini hevur uppskotið verið til hoyringar á Almannastovuni. Í svari uppá skrivligan fyrispurning í løgtinginum 7. februar í ár sigur Sámal Petur í Grund, landsstýrismaðurin, at 109 persónar eru dotnir úr skipanini, tí tey hava A-inntøku, og tí ikki lúka treytirnar til ta sjálvbodnu tryggingina. Fyri teir 109 persónarnar er

A-inntøkan farin upp um tey vegleiðandi 25 prosentini, sum ásett eru í viðmerkingunum, og eru hesi koyrd úr sjálvbodnu skipanini, tí tey lúka ikki treytirnar longur. 12 persónar eru koyrdir úr, tí hesir onga inntøku hava.



# Føli meg illa at skúgva annan partin heilt til viks

**Nú fiskidagatalið fyri næsta ár skal ásetast, heldur Henrik Old, at tað er óbehagiliga stórur munur á tilmælunum hjá fakliga serkunnleikanum og teimum sum arbeiða í vinnuni**



*– Tað er ódámligt at vit alla tíðinafinna upp á umberingar fyri at sleppa undan at gera broytingar, sigur Henrik Old, formaður í fiskivinnunevndini*

– Eg føli meg eitt sindur illa við at skúgva Fiskirannsóknarstovuna heilt til viks

Fyrsta stórmálið, sum nývalda vinnunevndin fær at viðgera, verður at áseta fiskidagatalið fyri komandi fiskiár, sum byrjar 1. september.

Henrik Old, nývaldur formaður í vinnunevndini ásannar, at tað er rættiliga stórur munur á, hvat fakligi kunnleikin á Fiskirannsóknarstovuni og tey, sum umboða fiskivinnuna, halda um hendan spurning. Fiskirannsóknarstovan mælir til at lækka fiskidagatalið rættiliga nógv í summum førum,

– Eitt nu mælir hon til at skerja fiskiskapin eftir toski heilt upp í 35% tey næstu tvey, trý árini.

Men vinnan heldur, at tað skal vera óbroytt og at ongin orsøk er til at lækka talið.

### Óbehagiliga stórur munur

– Tað er óbehagiliga stórur munur á tilmælunum hjá fakliga serkunnleikanum og teimum sum arbeiða í vinnuni og eg má siga, at eg føli meg rættiliga illa at skúgva annan partin heilt til viks, sigur Henrik Old.

– Vit eiga at vera ógvuliga varin við at skúgva tilmælini frá Fiskirannsóknarstovuni til viks, tí endar tað galið einaferð afturat, sum tað gjørdi fyrst í nítiárunum, er ongin ivi um, hvar svartiper endar, tí tað verður hjá politikarunum.

– Men eg eri púra samdur við teimum siga, at tilmælið frá Fiskirannsóknarstovuni er alt ov víðgongt til at tað kann fremjast, tí avleiðingarnar verða ov stórar.

Hann ásannar, at tað er lítið sannlíkt, at nakrar skerjingar verða gjørdar í ár.

– Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur róð framundir, at hann helst fer at skjóta upp, at fiskidagatalið skal verða óbroytt komandi ár.

– Ger hann tað, er tað helst avtalað frammanundan við samgonguna, og kanska ein part av andstøðuni við, at tað skal verða óbroytt komandi ár, og so er helst ikki nógv at gera.

Sagt verður, at nú skal fiskiflotin undir fylgissveinaeftirlit og at tað skal vera ein avmarking í sær sjálvum.

– Kanska er tað rætt og eg sigi heldur ikki, at fiskidagarnir skulu skerjast í ár. Men tað rættvísger ikki, at vit ikki taka trupulleikan upp og at onki verður gjørt.

– Tí haldi eg, at tað hevði verið ómetaliga ganligt um partarnir í fiskivinnuni, bæði fakligi serkunnleikin og umboð fyri vinnuna brúktu tíðina hetta til fiskidagarnir skulu ásetast fyri fiskiárið 2003-2004, til at semjast um, hvussu vit kunnu leggja upp fyri, at effektiviteturin økist, eins og hann hevur mælt til á hinari greinini her á síðuni.

Hann sigur sostatt, at hann saknar, at vinnan og Fiskirannsóknarstovan eru virknari í tí partinum av fiskivinnupolitikkinum.

# Fiskidagarnir skerjast við jøvnum millumbili

**–So hvørt sum fiskiflotin verður effektivari, eiga vit at minka fiskidagarnar eitt sindur, heldur Henrik Old, nývaldur formaður vinnunevndini**

FISKISKAPUR
*Áki Bertholdsen*

–Talið á fiskidøgum eigur at verða dagført við jøvnum millumbili.

Tað heldur Henrik Old, sum nú er blivin formaður í vinnunevndini.

Sjálvur var hann heitur talsmaður fyri at seta fiskidagaskipanina í gildi ístaðin fyri kvotuskipanuna.

Og hann heldur, at sum heild virkar fiskidagaskipanin heilt væl.

Men hann er heldur ikki bangin fyri at ganga beint ímóti streyminum. Og hóast hann er fiskimaður av yrki, er hann heldur ikki bangin fyri at siga, at vit eiga at skerja fiskidagatalið av og á.

– Tað er ongin ivi um, at fiskiflotin verður effektivari og effektivari sum tíðin líður. Amboðini og útgerðina verða betri og betri og skipini sjálvi verða betri og betri og talið á skipum broytist.

– Sostatt økja vit alla tíðina um trýstið á fiskastovnarnar og tað var ikki meiningin við fiskidagaskipanini.

Tí heldur Henrik Old, at vit eiga at finna eina skipan, har fiskidagarnir verða reguleraðir, ella minkaðir við av og á, so hvørt sum flotin verður effektivari og effektivari.

### Nevnd at kanna effektivitet

Hann heldur avgjørt, at tað er ein veikleiki við fiskidagaskipanini, at tað ikki finst ein slík skipan í henni, sum hevur til endamáls at kanna effektivitetin.

– Men skal hetta gerast, má tað sjálvsagt verða undir skipaðum viðurskiftum. Hann sigur, at spurningurin um, hvussu effektivur flotin er, og, hvussu effektiviteturin er broyttir seinastu tíðina, verður mangan orð ímóti orði.

– Tí eiga vit at seta eina nevnd, við umboðum fyri allar partar, bæði vinnuna og fakliga serkunnleikan, sum ár um ár skal hava til arbeiðis at rokna út, hvussu effektiviteturin hjá fiskiflotanum er broyttur seinasta árið.

Er niðurstøðan, at effektiviteturin ikki er øktur, er heldur ongin orsøk at broyta nakað, sigur hann

– Men er niðurstøðan hinvegin tann, at effektiviteturin er øktur, eiga vit at leggja upp fyri tí við at lækkafiskidagatalið eitt sindur, tí annars økist trýstið á fiskastovnarnar.

– Tað kundi kanska verið annaðhvørt, ella triðjahvørt ár, ella okkurt sovorðið, at fiskidagatalið varð skert fyri at leggja upp fyri øktum effektiviteti.

Tí heldur hann, at landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum eigur at seta eina slíka nevnd, sum skal hava til arbeiðis at rokna effektivitetin út.



*– Vit eiga at seta eina nevnd sum ár um ár skal at rokna út, um fiskiflotin er blivin effektivari. Er úrslitið tað, eiga vit at leggja upp fyri tí við at minka fiskidagarnar eitt sindur, tí annars økist trýstið á fiskastovnarnar, sigur Henrik Old, sum nú er formaður í vinnunevndini*

Hann vísir á, at tað er lítið sum talar fyri, at fiskidagatalið verður broytt í ár.

– Verða so heldar ongar broytingar gjørdar næsta ár, verður tað kanska fjórða árið, at effektiviteturin í flotanum ikki hevur ført til at fiskidagatalið er dagført.

– Tað er sigur eisini, at tað er ólíka lættari og lagaligari fyri vinnuna at laga seg til, tá ið fiskidagatalið verður skert 1-2% við jøvnum millumbili, fyri at leggja upp fyri effektivitetshækkingum, heldur enn at noyðast at gera munandi skerjingar í einum høggi, tá ið fiskiskapurin brádliga fer í botn, tí tað kann gerast ein skelkur, sum vinnan ikki yvirlivir, sum tað hendi fyrst í nítiárunnum.

– Ein partur av eini slíkari skipan kundi eisini verið, flotin keypir okkurt skip í verra endanum og býta nakrar av fiskidøgunum javnt út á allar hinar.

Henrik Old heldur, at tað skuldi helst verið so, at allir bátarnir í einum bólki hava at kalla sama fiskidagatal og tí dámar honum onki tankan um at tað skal bera til hjá einstøkum skipum at keypa aðrar fyri at leggja fiskidagar inn undir seg.

### Páska- og jólasteðg

Annars heldur Henrik Old, at vit eiga at umhugsa a leggja allan flotan nakrar dagar á páskum.

– Eg haldi, at vit eiga at seta ein páska og jólasteðg í gildi fyri fiskiflotan.

Hann sigur, at hetta hjava norðmenn havt í nøkur ár.

– Tað var eitt ramaskríggj, tá ið hetta varð sett í verk í Noregi, men nú hava teir vant seg víð tað.

Hann sigur, at orøkin til, at norðmenn gjørdu tað, var, at prísirnir eru so lágir á páskum.

– Tað sama uppliva vit á páskum og tað er hugaligari at gevast, tá ið prísurin er 20 krónur kilo, og so byrja aftur, tá ið prísurin er komin uppeftir aftur, heldur enn at lata prísin fella niður á 10 krónur og dragast við lágan prís í langa tíð.

– Vit brúka ov nógvar kreftir og ov nógvan fisk uppá at fáa prísin uppaftur. Tað hevði loyst seg betri at lagt flotan, áðrenn prísurin var fallin, heldur Henrik Old.

Á jólum liggur mest sum allur flotin frammanundan, men vit eiga at seta tað í verk politiskt, heldur hann.

### Má ikki henda aftur

Tað skilst á honum, at tað eru ikki minst minnini frá fyrst í nítiarunum, sum ræða hann og tí mælir hann til varsemi.

– Tá fór fiskiskapurin í botn. Men tá var tað skotið okkum politikarum í skógvarnar at vit lurtaðu ikki eftir ávaringunum frá fiskifrøðingunum, sum ár um ár høvdu víst okkum á, at trýstið á stovnarnar var ov stórt.

– Ein slíka støðu eiga vit fyri alt í verðini ikki at koma í aftur. Men eg ivist heldur ikki í, at skuldi tað hent, at fiskiskapurin sveik aftur, sum hann gjørdi tá, verða tað vit politikarar, sum koma at standa við svartaperi.

– Tað eru summi sum halda, at vit eiga at fiska, tá ið fiskur er, og tað er sjálvsagt ein hugaligur hugsunarháttur.

Men hann vísir eisini á, at Fiskirannsóknarstovan metir, at tá ið viðurskiftini í sjónum ganga okkum ímóti, kunnu vit fáa góðan tann góða fiskiskapin at vara nøkur ár longri við skynsamum fiskiskapi, enn enn hann annars hevði ger við tí hugburðinum at "fiska tá ið fiskur er"

– Er nakað um hetta sjónarmiðið, eiga vit at vera ómetaliga varin og ansa eftir, at trýstið á fiskistovnarnar ikki verður ov stórt fyri at forða fyri einum bakkasti sum tí, vit vóru fyri fyrst í nítiárunum.

– Vit fegnast øll um, at fiskiskapurin er góður og at prósurin er høgur. Men tað er ringt at hugsa seær, at vit fara at skerja í vánaligum tíðum, tá ið vit ikki gera tað í góðum tíðum, ta ið vinnan tolir tað betri, sigur Henrik Old at enda.